ítróttur
Nr. 164 • týsdagur • 31. august 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Gerster nýggjur landsliðsvenjari

**Danin Henrik Gerster skal venja føroyska A-landsliðið í hondbólti fram til smálandakappingina í desember 2005. Hann hevur longu boðað frá einum ættarliðsskifti á føroyska landsliðnum**

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*



*Henrik Gerster er nýggjur landsliðsvenjari, og hann hevur longu boðað frá einum ættarliðsskifti. Her sæst hann í dysti fyri H71, har hann framvegis verður leikandi venjari*
*Savnsmynd*

Hondbóltssamband Føroya hevur funnið mannin, ið skal føra landsliðið fram ímóti nýggjum avbjóðingum. Henrik Gerster, ið hevur verið leikandi venjari hjá H71 síðsta árið, skal nú eisini taka sær av landsliðnum. Hann fer framhaldandi at vera venjari hjá hoyvíkingum, og starvið sum landsliðsvenjari verður tí ikki fulltíðarstarv.

– Henrik Gerster hevur spælt yrkishondbólt í fleiri ár í Danmark og Týsklandi, og hansara drúgvu royndir á hægsta stigi vigaðu ógvuliga tungt, tá vit valdu at seta Gerster sum venjara, segði Eivind Jacobsen á tíðindafundi í ÍSF-húsinum mánamorgunin. Hann legði dent á, at trúvirðið hjá einum so royndum venjara er sera gott, og man kann líta á, at hann veit, hvat hann ger.

Gerster hevur tikið allar venjaraútbúgvingar innan hondbólt, og tí heldur Hondbóltssambandið seg hava fingið ein kompetentan og professionellan venjara.

– Gerster hevur fleiri altjóða royndir enn nakar føroyingur, og tí meta vit, at hann kann leggja nakað gott í okkara ungu leikarar, legði Eivind Jacobsen dent á.

## Nýtt ættarlið

Henrik Gerster hevur beinanvegin boðað frá, at hann hevur í hyggju at fremja eitt ættarliðsskifti á landsliðnum. Júst hvussu hetta fer at síggjast aftur á landsliðnum er ilt at siga í núverandi støðu, men tað er greitt, at ungir leikarar skulu mennast til at gerast landsliðsspælarar.

– Ætlanin er at menna nakrar ungar leikarar yvir eitt longri tíðarskeið, soleiðis at teir búnast og mennast sum hondbóltsspælarar. Hetta kann t.d. hava við sær, at tað ikki er tann besti leikarin júst í løtuni, sum verður úttikin, men at tann úttikni leikarin kann mennast til at gerast tann besti leikarin á hesum plássinum yvir eitt tíðarskeið, greiðir nýggi landsliðsvenjarin frá.

Hann sigur, at hann fer at hava tætt samband við allar hinar venjararnar í føroysku landskappingini, so at hann alla tíðina hevur ein fingur á pulsinum viðvíkjandi spælaraevnum.

– Eg vil hava leikarar, ið eru tilreiðar at offra tíð og orku uppá landsliðið, og sum vilja liva eitt lív, ið hóskar seg einum landsliðsleikara, leggur Gerster dent á.

## Reyður tráður

HSF hevur eisini ætlanir um at fáa støðug ungdómslandslið, sum kunnu vera við til at menna teir heilt ungu leikararnar. Her er eisini ætlanin at Henrik Gerster skal hava ein stóran leiklut.

– Málið er at gera hondbólt til ein heilársítrótt. Vit vilja fáa fatur á leikarum, ið vilja spæla hondbólt alt árið. Vegurin fram er at hava ungdómslandslið, so at vit á tann hátt fáa aktivera teir bestu ungu leikararnar. Tað má vera ein reyður tráður ígjøgnum landsliðsarbeiði hjá HSF, sigur Gerster.

Venjarin fer longu fríggjadagin at møtast við teimum føroysku venjarunum fyri at tosa um støðuna innan hondbóltin, og hvussu landsliðsarbeiði fer at vera komandi árini.

## Challenge Cup

Hondbóltssambandið fer ikki at luttaka í HM og EM-endaspølum framyvir, men ístaðin fer HSF at melda liðið til Challenge Cup, sum kvinnulandsliðið hevur sera góðar royndir frá.

Hetta er ein kapping, sum er ætlað smátjóðum so sum Malta, Kypros og Føroyum. Tað er frí tilmelding og tí er ikki greitt enn, hvørjum londum Føroyar skulu møta.

– Tað gevur onga meining at fara til Rumenia og tapa við átjan málum. Leikararnir mennast ikki av slíkum dystum, og tí skulu vit møta mótstøðuliðum, sum spæla á okkara støði, sigur Gerster avgjørdur.

Challenge Cup verður í desember í 2005, og tað er fyrst og fremst hendan kappingin, sum arbeitt verður fram ímóti.

Men aðrar avbjóðingar standa eisini fyri framman. Grønlendska hondbóltssambandið hevur 100-ára jubileum í vár, og tá er føroyska landsliðið bjóðað við í eina kapping, har onnur norðurlendsk lond luttaka.

Hetta verður fyrsta stóra avbjóðingin hjá Gerster sum landsliðsvenjara. Sáttmálin millum HSF og Henrik Gerster rennur út 31. desember í 2005, men ætlanin er at leingja samstarvið eftir hetta.

## Pengar og ambitiónir

Eivind Jacobsen, formaður í HSF, leggur dent á, at tað skal vera samband ímillum ambitiónir og pengar.

– Ambitiónir og pengar mugu hanga saman. Tí eru vit glaðir fyri at hava fingið ein venjara, ið kennir til føroysk viðurskiftir og kann leggja eina arbeiðsætlan út frá teimum umstøðum, sum vit arbeiða undir, sigur Eivind Jacobsen.

– Vit vilja arbeiða hart og professionelt, hóast vit bert eru amatørar fyri at menna føroyskan hondbólt.

### FAKTA UM GERSTER

- **Var leikandi venjari hjá H71 kappingarárið 1987-88**
- **Hevur spælt við bæði Hamen og VFL Wuppertal í týsku bundesliguni**
- **Hevur vunnið fimm meistaraheiti og seks steypakappingar við GOG**
- **Spældi Evropa Cup finalu við GOG ímóti Barcelona og hevur spælt 65 Evropa Cup dystir**
- **Hevur spælt tríggjar A-landsdystir fyri Danmark, tann fyrsta í 1994**



# Tølini talaðu fyri seg



*Rúni Nolsøe og Símun Eliasen eygleiða áleyparan Stankhov hjá B68, sum ikki formáddi sær stórvegis ímóti HB, sum stevnir ímóti triðja meistaraheitinum á rað*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Meðan HB so at siga fekk fulla úrtøku, tá ið teir í fyrra umfarinum høvdu brúk fyri tí, megnaði heimaliðið ikki at spæla seg til nakran møguleika**

B68-HB
*Jóannes Hansen*

Tað var botnur ímóti toppi. B68, sum er á veg í 2. deild, hevði vitjan av HB, sum er á veg ímóti meistaraskapinum. Tað sást væl, hvør var á veg hvønn vegin. Í 1. hálvleiki megnaði B68 ongantíð at hótta HB málið. Bárður Johannesen var púra arbeiðsleysur tey fyrru trý korterini.

Eitt korter var farið, áðrenn HB fekk hol á. Tað var ikki tí, at teir ikki høvdu verið í nánd av B68 málinum. Fleiri innlegg og hornaspørk vóru komin innfyri úr høgru, og tað var fleiri ferðir nær við og næstan, áðrenn tað eydnaðist.

Fyrsta korterið, áðrenn hol var komið á, tóktist tað sum um, at HB, sum annars hevði alt at siga, í verjupartinum stressaði seg sjálvt í so nógv. Í staðin fyri at spæla úr verjuni og umvegis miðvøllin og í álopið, varð ofta sparkað langt og høgt. Alt ov ofta tá ið hugsað verður um, at HB miðvøllurin er mannaður við so frægum bóltspælarum sum Rúna Nolsøe, sum Jóhan Petur Poulsen tóktist hava fingið sum uppgávu at renna aftaná, og Kára Nielsen sentralt og Jákupi á Borg og Heðini á Lakjuni í borðunum.

Men HB hevði størri tyngd og breidd, og tað var bara ein spurningur um, nær hol fór at koma á, og harnæst hvussu stórur sigurin fór at verða. Hallur Danielsen og ikki minst vikarurin í vinstra verjuborði, Rasmus Nolsøe, luttóku væl í uppspælinum, og Jan C. Dam vísti enn eina ferð, at hann er styrkur undir liðini á Símuni Eliasen.

B68 gjørdi sær ikki lívið léttari. Teir høvdu ilt við at fáa bóltin at ferðast millum sín fleiri ferðir, og serliga útlendsku spælararnir tóktust als ikki vera til reiðar til so stóra uppgávu. Oftast snúði tað seg hjá teimum mest um at vita, um nú dómarin fór at geva teimum fríspark.

Heðin á Lakjuni hevði nógv pláss at spæla á, og hann var upphavið til fyrsta málið. B68 misti á miðstrikuni og heilt í høgra borði. Heðin streyk avstað, legði innfyri, og bólturin fór út í hinum borðinum. Jákup á Borg legði innfyri, og brádliga stóð Heðin á Lakjuni leysur mitt fyri, tamdi og smekkaði í málið.

Tá var eitt korter farið, og tveir minuttir seinni varð 2-0. Heine Fernandez er snildur og royndur revur. Hann fór um koll, dómarin bríkslaði fyri ryggskumpi, og Rógvi Jacobsen, sum tykist ætla sær at verða toppskjútti, áðrenn hann fer til Íslands, smekkaði í málið.

So gekk tað sum eftir ánni hjá HB, sum støðugt helt til á helvtini hjá heimaliðnum. Jákup á Borg spældi seg sjálvan leysan við hælinum, áðrenn hann smekkaði í stólpan, og Heðin, Heine og Rógvi vóru eisini framvið.

Lítlu løtuna undan steðginum varð greitt, at talan fór at verða um stórsigur. Fyrst gav B68 miðverjan Jákupi á Borg bóltin, og hann takkaði fyri, og so var Rógvi Jacobsen hægstur og stútaði til 4-0.

Eftir steðgin vóru HB menninir ikki so konsentreraðir. Skipanin av liðnum fór eitt sindur av lagi. Ov nógvir vóru ov langt frammi, og ov nógvir hugsaðu ov nógv um at klatra upp eftir skjúttaralistanum. Heðin á Lakjuni fekk einasta málið, tá ið lítil løta var farin. Heðin, Heine, Rógvi og Jákup høvdu møguleikar, men tað komu ikki fleiri mál. Fleiri ferðir vóru HBarnir yvirmannaðir undir B68 málinum, men innleggini hjá Jákupi á Borg vóru ikki so neyv, sum tey plaga at vera.

## Føroyska loysnin

Trygvi Mortensen gjørdi tvær skiftingar í steðginum. Toftamenn komu á vøllin fyri útlendskar spælarar, onkrar rokeringar vórðu framdar í uppstillingini, og tað royndist nógv betur, enn tað hevði gjørt í fyrra umfarinum.

Tað kann sjálvandi eisini hava við tað at gera, at HB liðið ikki var so savnað um uppgávuna eftir steðgin, sum teir høvdu verið undan steðginum. Men tað var eingin ivi um, at toftaliðið vísti betri hugburð, enn tað frammanundan hevði gjørt. At halda tørn um henda hugburðin fer neyvan at bjarga plássinum í bestu deildini, men fyri framtíðina eigur hann at vera týdningarmikil. Veteranarnir Øssur Hansen og Jákup Eli Olsen royndu at skumpa undir, Øssur Jacobsen arbeiddi nógv, og Kristian Anton Andreassen var óførur.

Men B68 kundi einki gera við HB. Tølini siga frá, at tað var toppur ímóti botninum.

### FAKTA UM DYSTIN

**B68-HB 0-5 (0-4)**
0-1: Heðin á Lakjuni 15.
0-2: Rógvi Jacobsen br 18.
0-3: Jákup á Borg 41.
0-4: Rógvi Jacobsen 42.
0-5: Heðin á Lakjuni 56.
**Dómari:** Jens Petur Brattalíð
**B68:** Meinhardt Joensen - Ronni Svalbard, Bogi Petersen, Kári Sigvardsen, Jákup Eli Olsen - Morilo (Øssur Jacobsen, 46.), Jóhan Petur Poulsen, Eyðstein Skipanes, Øssur Hansen - Stanislaw Stankhov, Anderson (Kristian Anton Andreassen, 46.)
**Gult kort:** Ronni Svalbard, Øssur Hansen
**HB:** Bárður Johannesen - Hallur Danielsen, Jan C. Dam, Símun Eliasen, Rasmus Nolsøe - Jákup á Borg, Rúni Nolsøe, Kári Nielsen, Heðin á Lakjuni - Heine Fernandez, Rógvi Jacobsen
**Gult kort: eingin**

# Taka ein dag í senn

**B68 formaðurin heldur onga orsøk vera at rokna við, at felagið fer um koll, hóast besta liðið fer í næstbestu deildina at venda**

B68 Á BOTNINUM
*Jóannes Hansen*

B68 er ikki flutt niður. Men gongdin í seinastu fýra umførunum skal vera heilt øðrvísi, enn hon hevur verið, um tað ikki næsta ár skal verða leygardagsfótbóltur á Svangaskarði. Kravið til B68 er, at teir vinna tríggjar av fýra dystum, og at ein av hesum dystunum er ímóti ÍF, sum heldur ikki skal fáa stig í nøkrum øðrum dysti. B68 hevur ikki vunnið í fjúrtan teimum fyrstu royndunum, og tí er møguleikin hjá B68 meiri enn pappírstunnur.

– Vit taka ein dag í senn, og vit fara sjálvandi at stríðast fyri møguleikanum, sum vit hava. Men eg má viðganga, at tað sær svartari út nú, enn tað gjørdi undan vikuskiftinum, sigur Niclas Davidsen, formaður í Tofta Ítróttarfelag.

*Tað kemur illa við, um tit flyta niður?*

– Vit mugu fyrihalda okkum til veruleikan. Enn er tað ikki veruleiki, at B68 skal flyta niður. Men um hetta verður veruleiki, so mugu vit arbeiða út frá tí. B68 hevur verið í bestu deildini í fleiri enn tjúgu ár. Tað er hugaligari at vera við í fremstu røð, og endar tað við, at B68 flytir niður, so fara vit at stríðast fyri at sleppa upp í part aftur, sigur B68 formaðurin Niclas Davidsen.

# Leiðslan ætlar einki at gera

**Um viðhaldsfólk í tí loynda ætla at skipa fyri meistarafagnaði í Gundadali annan sunnudag, sigur HB formaðurin seg ikki vera harra yvir, men felagið fer ikki at fyrireika veitsluhald**

HB Á TOPPINUM
*Jóannes Hansen*

HB formaðurin var, sum vera man, rættuliga væl nøgdur við tað, sum hann sá hansara lið avrika á Svangaskarði sunnudagin.

Nú fara tit at skipa fyri FM fagnaði, tá ið tit fara at spæla ímóti B36?

– Vit eiga dystin, og tað hevði verið hugaligt, um nógv viðhaldsfólk høvdu møtt fyri at stuðla okkum ímóti B36. Men felagið roknar henda dystin sum allar aðrar landskappingardystir, og tað veit eg, at spælararnir eisini fara at gera. Vit hava ikki vunnið meistaraskapin, men sjálvandi sær tað rættuliga gott út. Um viðhaldsfólkini fara at fyrireika okkurt, kunnu vit í nevndini sjálvandi ikki siga nakað um. Eg rokni í hvussu so er við, at talan verður um torføra uppgávu, men eg haldi, at avrikini higartil í ár hava víst, at okkum nýtist ikki at vera bangnir fyri nøkrum, heldur Birgir Enghamar.

– Eg má siga, at á Svangaskarði hevði eg ilt av B68 og formanninum, Niclasi Davidsen, sum eg havi gott samskifti við. Teir hava verið leingi í bestu deildini, og teir hava verið við til at sett dám á kappingarnar. Tað er ikki meiri enn eitt ár síðani, at vit kappaðust við teir um meistaraskapin. Men avrikið hesa ferð vísti, hví støðan hjá teimum er, sum hon er. Tað var bara fyrsta partin av seinna umfarinum, at teir vístu nakað, er meiningin hjá HB formanninum.